

# MÁNAÐARBRÆV

OKTOBER 2015

## - SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK

### KOMANDI TILTØK

- Sendistovan verður við á "Altjóða degnum" 12. november á Háskóla Íslands
- Nevndin í Atlantsflog vitjar sendistovuna 26. november.

## FØROYAR Á BREDDANUM Í REYKJAVÍK

Føroyar fingu veruliga gjørt um seg í Reykjavík í oktober mánaði. Fyrru ferð, tá Arctic Circle varð hildið í døgunum 16. til 18. oktober. Tað vóru áleið 2.100 luttakarar á ráðstevnuni úr fleiri enn 50 londum og harvið fultsett. Leygardagin 17. oktober hevði Føroyar eina framløgu á høvuðspallinum í ein hálvan tíma, sum hevði heitið: "*REDRAWING THE ENERGY AND ECONOMIC MAP: THE FAROE ISLANDS' MOVE FROM PERIPHERY TO CENTRAL HUB IN THE ARCTIC*". Aksel V. Johannesen, løgmaður, legði fyri, síðani hevði Sjúrður Skaale, fólkatingslimur eina framløgu og seinast greiddi Hákun Djurhuus, stjóri í SEV frá. Áleið 800 áhoyrarar vóru komnir saman at hoyra føroysku framløguna og stórur áhugi var fyri henni.

*Les greinina hjá Jan Müller um framløguna* her

> *»nógvar positivar viðmerkingar hava vit fingið um tey góðu avrikini, sum føroyingar hava framt«*

Seinnu ferð var á Ársfundi Norðurlandaráðsins seinni í oktober mánaði. Har vóru Føroyar væl umboðaðar við løgmanni, landsstýrisfólkum, norðurlandaráðslimum, Útnorðurráðslimi og embætisfólkum. Nógv fundarvirksemi var og fleiri tvípartaðir fundir vóru eisini millum løgmann og landsstýrisfólkini og teirra starvsfelagar í Reykjavík, bæði við íslendskar stjórnarlimir og norðurlendskar. Týskvøldið 27. oktober fekk SEV handað Norðurlandaráðsins náttúru- og umhvørvisprís. Hetta var eitt serligt hæddarpunkt.

Tað er ongin ivi um, at Føroyar hava gjørt um seg í Reykjavík í hesum førum, tí nógvar positivar viðmerkingar hava vit fingið, bæði frá íslendingum og frá sendistovukervinum um tey góðu avrikini, sum føroyingar hava framt. Umdømi Føroya er betrað enn meira í hesum døgum. Longu nú hava føroyingar sett seg í samband við sendistovuna um ætlaða luttøku í Arctic Circle í 2016.







*Føroyska sessiónin á Arctic Circle 2015*



*Jákup Suni Lauritsen og Hákun Djurhuus frá SEV til móttøkuna á sendistovuni*

## FØROYAR VUNNU NÁTTÚRU- OG UMHVØRVISPRÍSIN

Norðurlandaráðið letur 5 virðislønir í sambandi við Ársfundin, sum í ár varð hildin í Reykjavík; bókmentavirðisløn, barna- og ungdómsbókmentavirðisløn, kykmyndavirðisløn, tónleikavirðisløn og náttúru- og umhvørvisvirðisløn. Í 4 av teimum 5 virðislønunum vórðu føroyingar í uppskoti. Hetta má sigast at vera avbera flott. Tað eydnaðist SEV at vinna náttúru- og umhvørvisvirðislønina í kapping við 10 onnur.

*Grundgevingin kann síggjast her (eins og ein stutt sv-samrøða sæst við SEV stjóran)*

Seinni sama kvøld skipaði sendistovan fyri einari móttøku í hesum sambandi. Nógv fólk møtti upp fyri at siga SEV tillukku og fleiri røður vórðu hildnar. M.a. helt løgmaður røðu, Sirið Stenberg, ið eisini er landsstýriskvinna í umhvørvis- og orkumálum, nevndarformaðurin og stjórin í SEV fluttu eisini fram røður, íslendskir politikarar o.o. við.




### Samband

**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo
Finn okkum á Facebook

# Íslendsk samfelagsviðurskifti

## LØNARSAMRÁÐINGAR

Eftir drúgvar lønarsamráðingar, ið endaðu við verkfalli, fekst semja í lag tann 28. oktober millum stjórnina og Sjúkrahjálparafelag Íslands, Fakfelag í almannatænastu og løgreglufólk. Sáttmálin hevur m.a. við sær upp til 30% lønarhækkan yvir næstu 4 árini. Hetta er áleið tað sama sum fleiri fakfeløg hava fingið.

## BRETSK FORSÆTISRÁÐHARRAVITJAN

Bretski forsætisráðharrin David Cameron var á vitjan í Íslandi 28. oktober. Hann kom í sambandi við Northern Future Forum 2015. Tað er 5. ferð at forsætisráðharrarnir úr norðurlondum, baltisku londunum og bretska kongaríkinum koma saman at kjakast um framtíðar rák í norður-Evropa.

Í sambandi við túrin higar, vitjaði David Cameron somuleiðis íslendska forsætisráðharran Sigmund Davíð Gunnlaugsson til fund í Altinginum. Tað eru 74 ár síðani ein bretskur forsætisráðharri hevur verið á almennari vitjan í Íslandi. Winston Churchill vitjaði í 1941, 3 ár áðrenn Ísland gjørdist sjálvstøðug tjóð.

*Les grein um vitjanina her*

*Les meira um Northern Future Forum 2015 her*



*David Cameron og Sigmundur Davíð Gunnlaugsson*

# Virksemi hjá sendistovuni (brot)



*Heilsumálaráðharrarnir Sirið Stenberg og Kristján Þór Júlíusson saman við embætisfólki teirra á fundi. Sendistovan luttók eisini*

## VITJANIR, FUNDIR OG MÓTTØKUR

Í sambandi við Ársfund Norðurlandaráðsins vóru fleiri fundir og móttøkur í hølunum hjá sendistovuni og eisini ein fundur uttanhýsis, sum sendistovan tók lut í.

Sendimaðurin hevur í oktober mánaði vitjað m.a. pólska sendiharran, týska sendiharran, bretska sendiharran, japansku sendifrúnna, franska sendiharran, havt vitjan av íslendska sendiharranum í Grønlandi, vitjað Almanna- og heilsumálaráðið (Velferðarráðuneytið), Mentamálaráðið (Mennta- og menningarmálaráðuneytið), Umhvørvis- og náttúrutilfeingismálaráðið (Umhverfis- og auðlindaráðuneytið), Fíggjarmálaráðið (Fjármála- og efnahagsráðuneytið), Uttanríkisráðið (Utanríkisráðuneytið) og Forsætisráðið (Forsætisráðuneytið). Harumframt hevur sendimaðurin luttikið í fleiri móttøkum o.ø. Talan hevur verið um áhugaverdar vitjanir og serliga hava íslendsku stjórnarráðini víst nøgdsemi við samstarvið við tey stjórnarráð, sum tey samstarva við í Føroyum. Onnur íslendsk ráð, sum ikki hava samstarv við føroysku miðfyrisitingina, vilja fegin hava samstarv við okkum í Føroyum.



*Fiskivinnumálaráðharrarnir Høgni Hoydal og Elisabeth Aspaker fundast í hølunum hjá sendistovuni*

Á fundinum hjá Sirið Stenberg og Kristján Þór Júlíusson í hølunum hjá Velferðarráðnum, kom fram at íslendski heilsumálaráðharrin arbeiðir við einari nýggjari heilivágslóggávu, ið ætlandi verður løgd fyri Altingið í februar 2016, sum fer at loyva føroyskt framleiddum heilivági atgongd til íslendska marknaðin. Gongst eftir ætlan, verður møguligt at selja føroyskt framleiddan heilivág á íslendska marknaðinum til heystar næsta ár.



*Petur Petersen og Pétur Ásgeirsson*

## VITJAN ÚR NUUK

Íslendski sendiharrin í Nuuk, Pétur Ásgeirsson, vitjaði sendistovuna. Talan var um eina óformligari vitjan, men hóast tað, so vóru ymisk mál umrødd. Íslendski sendiharrin hevði skrivað eina grein í grønlendska blaðnum Sermitsiaq í oktober 2014, sum hevði heitið “Island – Den ideelle partner for erhvervslivet i Grønland”. Greinin varð skrivað eftir at Pétur Ásgeirsson hevði verið í Grønlandi í eitt ár og í sambandi við, at Ísland skipaði fyri einari vinnuráðstevnu í Nuuk í oktober 2014.



Island - den ideelle partner for erhvervslivet i Grønland

Sendimaður okkara hevði lisið greinina fyri fundin. Greinin, sum lýsir møguleikarnar fyri samstarvi millum Ísland og Grønland, er sera positiv. Tá ið íslendski sendiharrin varð spurdur um teir møguleikar, sum vórðu nevndir í greinini, so mátti hann staðfesta, at enn var ikki komið so nógv burturúr teimum. Tað var ikki so einfalt, at broyta grønlendsku siðvenjuna. Men hóast tað, so verður arbeitt víðari við at menna samstarvið landanna millum. Á heilsuøkinum er komið væl burturúr. Vónirnar eru annars góðar fyri øðrum samstarvi millum Ísland og Grønland.

*Sí greinina her*



*Uttanríkis- og vinnumálaráðharrin heldur røðu*

## MÓTTØKA FYRI FØROYINGUM Í ÍSLANDI

Sendistovan skipaði, í samstarvi við Norrøna Felagnum í Føroyum og Føroyingafelagnum í Íslandi, fyri móttøku í veitsluhølunum í bygninginum, har sendistovan húsast. Fitt av fólki var komið saman. Løgmaður greiddi frá nýggju samgonguni, Poul Michelsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, ið eisini er norðurlendskur samstarvsráðharri, flutti fram røðu. Sama gjørdi Turid Christophersen, formaður í Norrøna Felagnum. Aðrir politikarar nýttu eisini høvi at siga nøkur orð.



*Nógv fólk møttu til móttøkuna mikukvøldið*

## SENDISTOVUMÓTTØKA FYRI FØROYSKU SENDINEVNDINI

Mikukvøldið 28. oktober skipaði sendistovan fyri móttøku fyri føroyingum, sum tóku lut í ársfundinum hjá Norðurlandaráðnum.

Nógv fólk møttu til móttøkuna í hølunum hjá sendistovuni. Grønlendska og álendska sendinevndin kom eisini, so vit vórðu heilt nógv fólk til móttøkuna, sum var væleydnað.

## POSTA

Vit umrøddu trupulleikarnar við postflutningi úr Føroyum til Íslands í seinastu útgávu av mánaðarbrævinum. Posta er nú farið at gera sonevndar testsendingar millum Føroyar og Ísland, so funnið kann verða fram til, hvat bagir. Tað kann taka millum 7 og 10 dagar at fáa eitt vanligt bræv úr Føroyum til Íslands, men hetta eigur bert at taka 3-4 dagar, og vónandi verður støðan bøtt.

## INTERNETIÐ

Vit umrøddu eisini seinast vánaliga teldusambandið, sum sendistovan hevur við KT-landsins. Kanningar hava nú verið gjørdar og vísir tað seg, at internetsambandið, sum er frá Føroya Tele, fer um fleiri ambætarar og er tí ikki so beinleiðis til Íslands. Roynt hevur síðani verið at flutt internet veitingina til Vodafone og hevur tað víst seg, at ferðin gerst millum 5 og 7 ferðir skjótari, tí Vodafone hevur eitt meira beinleiðis samband við Ísland. Við Vodafone sambandinum er internetsambandið brúkiligt. Arbeitt verður nú við at finna fram til um sendistovan skal flyta yvir á internetið hjá Vodafone, ella um Føroya Tele, sum er vanligi internet veitarin hjá KT-landsins, kann bøta um sína internet ferð til Íslands. Mest sannlíkt er, at hinar sendistovurnar, sum eisini hava sera vánaligt internet samband til Føroyar, eru fevndar av somu avbjóðingum, sum sendistovan í Íslandi.

# Í næstum..

## "INTERNATIONAL DAY"

Tann 12. november fer starvslesandi, Katrina Eyðunsdóttir Hansen, at vera við á "Altjóða Degnum" hjá Háskóla Islands. Tað er eitt tiltak, gjørt fyri at kunna um ymsar útbúgvingarmøguleikar og somuleiðis mentanir kring heimin. Vit hava fingið tilfar frá Fróðskapasetrinum; faldarar og plakatir at lýsa við, og eiga eisini lýsingartilfar frá Visit Faroe Islands, ið vit somuleiðis taka við.

## ATLANTIC AIRWAYS

26. november kemur nevndin í Atlansflog at vitja sendistovuna og fer sendimaðurin at greiða frá um virksemið hjá Sendistovu Føroya í Íslandi. Eftir hetta hevur felagið nevndarfund í hølunum hjá sendistovuni.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
Túngata 14
101 Reykjavík